# Esbjerg rættir Tórshavn vinar



Borgarstjórin í Esbjerg, Johnny Strørup kvettir snórin, sum er festur í tvær ljósboyur og herviđ er nýggi motorvegurin millum Føroyar og europeiska meginlandið alment tikin í brúk

Mynd Jan Müller



Ikki færri enn tríggir landsstýrismenn vóru við til vígsluna av nýggju rutuni millum Føroyar og Esbjerg, Jóannes Eidesgaard, Johan Dahl og Jørgen Niclassen

Mynd Jan Müller




Fýra av yvirmonnunum á Norrønu til móttøkuna umborð

Mynd Jan Müller



Johan Dahl, vinnumálaráðharri hittir skiparan á Norrønu, Sverra Kjærbæk umborð

Mynd Jan Müller

**Tá borgarstjórin í Esbjerg, Johnny Søtrup kvetti vígslusnórin á byggjuni í Esbjerg á middegi, nú Norrøna aftur er farið at sigla uppá Esbjerg, nýtti hann eisini høvi til at bjóða Havnini at gerast vinarbýur hjá Esbjerg**

*Jan Müller*
*úr Esbjerg*

Hóast bítandi kulda so hitaði Chanty-kórið upp til hátíðarløtuna á bryggjuni í Esbjerg á middegi, tá enn ein nýggj byrjan í longu søgu Smyril Lines fór av bakkastokki. Leiðslan í fyritøkuni hevur nevniliga gjørt av at sigla uppá Esbjerg heldur enn Hanstholm í vetrarhálvuni. Og tað var við manér og hátíðardámi, at henda broyting á siglandi motorvegnum varð framd. Við borgarstjóranum í Esbjerg, Johnny Søtrup á odda varð sett hol á hetta nýggja kapitullið í føroyskari siglingarsøgu. Við einum føroyskum grindaknívi skar hann snórin, sum varð festur í tvær ljósboyur. Hann beyð Smyril Line vælkomið aftur til Esbjerg. Borgarstjórin ikki bert fegnaðist um, at Norrøna nú aftur fer at sigla uppá Esbjerg. Hann helt fyri, at nú Esbjerg ongan vinarbý hevði í Føroyum, so vildi hann nýta hetta høvið, nú Norrøna var komin úr Havnini til Esbjerg, at bjóða Tórshavnar Kommunu at gerast vinarbýur hjá Esbjerg. Eftir sang og tónleik og røður varð farið umboð á Norrønu til ein betri bita, har grind og froskar vóru á matarskránni. Har varð so eisini høvi hjá fleiri av gestunum at siga nøkur orð. Meira verður at hoyra um hetta í vinnusendingini á Rás2 týsdagin og at lesa í Sosialinum í komandi viku. Eisini verða livandi myndir at síggja undir Kykmyndir á Portalinum í komandi viku.



Frá vinstru: Petur Holm, stjóri, Johnny Søtrup, borgarstjóri, Eyðdis Hartmann Niclassen, skrivari, Klaus Kjærulff, nevndarformaður, Kurt Skov, stjóri í Blue Water og Johan Dahl, vinnumálaráðharri

Mynd Jan Müller